# Almanna- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 05.07.2023 |
| Mál nr.: | 23/13147-15 |
| Málsviðgjørt: | AJ/TVR |
| Ummælistíð: | 06.07.2023-11.08.2023 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg**
**um**
**stuðul til at byggja stórhøll í Hoyvík**

**§ 1.** Landsstýrismaðurin fær heimild til at lata 30 mió. kr. í stuðli til at byggja stórhøll í Hoyvík.
*Stk. 2.* Stuðulin verður útgoldin samsvarandi byggigongdini, í sama lutfalli sum hinir stuðulsveitararnir gjalda.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í tilsøgn áseta nærri treytir fyri útgjaldi av stuðlinum.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2026.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

## 1.1. Orsakir til uppskotið

Á fíggjarlógini fyri ávikavist 2022 og 2023 eru 5 mió. kr. settar av til at stuðla verkætlanini at byggja stórhøll í Hoyvík. Eftir ætlan skal verkætlanin stuðlast við 10 mió. kr. í ávikavist 2024 og í 2025, so samlaði stuðulin frá landinum gerst 30 mió. kr.

Verkætlanin er skipað í sjálvsognarstovnin Føroya Arena. Sambært viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin setur Tórshavnar kommuna stovnin á stovn, tó uttan at hava rættindi í mun til ogn ella møgulig avlop hjá stovninum. Stovnurin heftir sum sjálvsognarstovnur einsamallur fyri stovnsins skyldur og møguligt hall. Sjálvsognarstovnurin verður stýrdur av eini nevnd, sum hevur 5 limir, har Tórshavnar kommuna velur 2, Vinnuhúsið velur 1, ÍSF velur 1, og P/F Visit Faroe Islands, velur 1 lim.

Sambært galdandi játtanarskipan krevst ein heimildarlóg, tá ið landið skal geva tilsøgn um stuðul yvir fleiri fíggjarár. Á fíggjarlógini fyri 2022 vórðu 5 mió. kr. játtaðar í stuðli, og tilsøgn var givin 9. des. 2022 og stuðulin varð ikki útgoldin í játtanarárinum, men støðlaður. Í samráð við Fíggjarmálaráðið varð støðlaða játtanin frá 2022 útgoldin á sumri 2023, tó so at 10% varð afturhildið samsvarandi tilsøgnini frá táverandi Uttanríkis- og mentamálaráðnum (Nú: Almanna- og mentamálaráðið). Til at geva tilsøgn um restina av stuðlinum í seinni fíggjarárum krevst heimildarlóg samsvarandi játtanarskipanini, ið eisini fevnir um útgoldna stuðulin sum var játtaður í 2022.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Eingin galdandi lóggáva er økinum, men á fíggjarlógini fyri 2022 vórðu 5 mió. kr. settar av til endamálið. Tann 9. des. 2022 bleiv givin ein bindandi tilsøgn um stuðul til verkætlanina frá táverandi Uttanríkis- og mentamálaráðnum áljóðandi 5 mió. kr. Á fíggjarlógini fyri 2023 blivu somuleiðis settar 5 mió. kr. av, og í viðmerkingum til játtanina á fíggjarlógini fyri 2023 stendur, at ætlanin er at seta 10 mió. kr. av í ávikavist 2024 og 2025, tá ið verkætlanin væntandi verður liðug.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at geva landsstýriskvinnuni í mentamálum neyðugu heimildina at geva tilsøgn og veita stuðul til verkætlanina árini 2022 til og við 2025.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið ber í sær, at landsstýriskvinnan kann geva tilsøgn at veita stuðul í fleiri fíggjarárum, innanfyri ásettan fíggjarkarm, sum er tilskilaður í heimildarlógini, sum í hesum føri er játtaði stuðulin fyri 2022 áljóðandi 5 mió. kr.; játtaði stuðulin fyri 2023 áljóðandi 5 mió. kr.; ætlaða játtanin fyri 2024 áljóðandi 10 mió. kr., og ætlaða játtanin fyri 2025 áljóðandi 10 mió. kr.

Stuðulin verður útgoldin sum á konto gjøld samsvarandi byggigongdini, í sama lutfalli sum hinir stuðulsveitararnir gjalda. Tó verða 10% av samlaðu stuðulsupphæddini hildin aftur og útgoldin, tá treytir sum Almanna- og mentamálaráðið setir eru loknar.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Ummælispartarnir eru:
Hini stjórnarráðini
Sjálvsognarstovnurin Føroya Arena
Tórshavnar kommuna
Vinnuhúsið
ÍSF
P/F Visit Faroe Islands

**Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum**

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Ætlanin er at játta 20 mió. kr. í 2024 og 2025 afturat teimum játtaðu 10 mió. kr. fyri 2022 og 2023. Sostatt er talan um fíggjarligu avleiðingar fyri landið áljóðandi 30 mió. kr., um ætlanin fyri 2024 og 2025 verður játtað.

Á heimasíðuni hjá sjálvsognarstovninum, Føroya Arena, stendur:

*"Føroya Arena fer íroknað alt (eisini parkeringsøki kring høllina) at kosta 217,8 mió. kr. (uttan mvg) at byggja. Tað tekur umleið 20 mánaðir at byggja stórhøllina.*

*Metingarnar eru gjørdar av Articon, sum eisini hevur heintað inn ítøkiligar prísir upp á flest allar smálutir í sambandi við byggingina av Føroya Arena.*

*Árligi raksturin av Føroya Arena fer at kosta umleið 3,75 mió. kr. Harumframt verður umleið ein hálv millión løgd í viðlíkahaldsgrunn hvørt ár, soleiðis at peningur er tøkur til størri viðlíkahald, sum koma við árunum."*

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Umsitingarliga verður stuðulin frá landinum útgoldin, tá ið treytirnar í eini komandi tilsøgn eru loknar, t.v.s. at stuðulin verður útgoldin sum á konto gjøld samsvarandi byggigongdini, í sama lutfalli sum hinir stuðulsveitararnir gjalda. Tó verða 10% av stuðulsupphæddini hildin aftur og útgoldin, tá Almanna- og mentamálaráðið hevur fingið váttan fyri, at niðanfyri standandi treytir eru loknar:

- at verkætlanin í síni heild er framd, at endalig uppgerð yvir samlaða kostnaðin er latin Almanna- og mentamálaráðnum, og at arbeiðstøkan er handað byggiharranum, so sum ásett er í galdandi arbeiðstakarasáttmála,
- at endaligt skeyti er tinglýst á ognina uttan rættarviðmerkingar,
- at eigarin eftir áheitan frá og vegna Almanna- og mentamálaráðið letur lýsa byrðu á ognina/bygningin, um at søla, avhendan, útleigan, veðseting ella broyting í nýtsluni av ognini/bygningum einans kann fara fram við skrivligum loyvi frá Føroya landsstýri,
- at bygningurin lýkur øll neyðug myndugleikakrøv sambært galdandi byggireglugerð, galdandi byggisamtykt, umframt møguligar serstakar treytir, ið álagdar eru í byggiloyvinum. Tað er somuleiðis eitt krav, at bygningurin er endaliga brunagóðkendur,

- at avvarðandi byggimyndugleiki hevur fráboðað eigaranum endaligt nýtsluloyvi til bygningin, og
- at endaligur grannskoðaður roknskapur er latin Almanna- og mentamálaráðnum og góðkendur av ráðnum.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna annað enn, at sjálv byggingin fer at skapa virksemi fyri byggivinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Byggingin fer at hava avleiðingar fyri tað grøna økið við Stórutjørn í Hoyvík, har ætlanin er at byggja høllina. Sambært heimasíðuni er talan um eina samlaða gólvvídd á áleið 8.350 m2.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Lógaruppskotið fer at hava við sær økt virksemi í ávísum øki í høvuðsstaðnum, men endamálið við nýggju høllini fevnir um allar borgarar í landinum. Sambært heimasíðuni verður skrivað:

*"Føroya Arena kann so statt væl hýsa landsdystum hjá A-landsliðunum í hondbólti eins og landsdystum og altjóða kappingum hjá flest øllum innandura ítróttagreinunum í Føroyum.*

*Talan er um ein bygning, sum er lætt broytiligur, skilt soleiðis, at tað er lætt og skjótt at broyta uppseting frá venjingarhøll til ein landsdyst, til eina konsert ella eitt samfelagsmøti.*

*Samanumtikið fer Føroya Arena at bjóða øllum føroyingum til tiltøk av alskyns slag og lyfta støðið fyri upplivingarmøguleikum í Føroyum – øllum borgarum í landinum til gleði og gagns.*

*Føroya Arena ber við sær ávísa nýskapan, og fyriskiparar kring landið fara at skapa nýggj annarleiðis tiltøk, sum vit kanska ikki eru von við í Føroyum.*

*Tað ber sostatt til at hava eina fulla venjingarhøll hóskvøld, ein A-landsdyst í hondbólti fríggjakvøld, eina stóra konsert leygarkvøld og eitt samfelagsmøti sunnudag. Hetta merkir eisini, at virksemið gerandisdagar ikki verður stórvegis ávirkað av størri tiltøkum í vikuskiftunum."*

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Ikki einans fær verkætlanin jaligar avleiðingar fyri hondbóltin, sum hevur klárað seg serstakliga væl seinnu árini, og føroyska U21 og A-landsliðið í manshondbólti teljast millum tey bestu í heiminum av sínum slagi. Lógaruppskotið er eisini við til at stuðla einari verkætlan, ið hevur jaligar avleiðingar fyri *allar* samfelagsbólkar og felagsskapir í landinum. Á heimasíðuni stendur m.a.:

***"Brúkaraskarin er fjøltáttaður og fevnir millum annað um:***

- *Barnagarðar*
- *Pensjónistar*

- *Úrvalsítróttafólk*
- *Kondirennarar*
- *Áskoðarar á konsertum*
- *Luttakarar á ráðstevnum*
- *Áskoðarar til landsdystir*
- *Ítróttastevnuluttakarar*
- *O.s.fr.*

***Ágóðin av fjøltáttaðu nýtsluni er nettupp styrkin í innihaldinum:***

- *at ættarliðini møtast*
- *at leikfólk møta úrvalsspælarum*
- *at tónleikur, list og andaligt virksemi møtir ítróttinum*
- *at heimsmeistarar møta børnum í bóltspæli"*

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Eingir millumtjóðasáttmálar eru, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar sum land hava skyldu at fylgja.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at nakrir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar fyri Føroyar eru, sum eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið er ikki fevnt av EMRS.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Mett verður ikki, at lógaruppskotið um at veita stuðul til verkætlanina er fevnt av Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Tó má berast so í bandi, at atkomuviðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, verða tryggjað.

**2.9. Markaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið ber í sær nakrar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Nei.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Nei.

**2.12. Gjøld**
Nei.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Nei.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Ikki annað enn, at landsstýrismaðurin fær heimild til at veita tilsøgn og at rinda stuðulin – eisini í seinni fíggjarárum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Ja | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Ja | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Greinin tryggjar, at landsstýrisfólkinum verður heimilað at veita stuðul í seinni fíggjarárum, innan fyri ásettan fíggjarkarm, sum er tilskilaður í hesi heimildarlógini. Í stk. 2 er ásett, at stuðulin verður útgoldin samsvarandi byggigongdini (t.e. á konto gjald), í sama lutfalli sum hinir stuðulsveitararnir gjalda. Tá ið lógin er samtykt, kann nýggj tilsøgn latast umsøkjarunum fyri restupphæddina, og stuðulin rindast út. Eisini verður heimilað landsstýrismanninum at áseta nærri treytir fyri stuðli, ið eru meinlíkar teimum, ið vóru givnar fyrru tilsøgnini frá 9. des. 2022, har tað m.a. stóð:

- at verkætlanin í síni heild er framd, at endalig uppgerð yvir samlaða kostnaðin er latin Uttanríkis- og mentamálaráðnum, og at arbeiðstøkan er handað byggiharranum, so sum ásett er í galdandi arbeiðstakarasáttmála,
- at endaligt skeyti er tinglýst á ognina uttan rættarviðmerkingar,
- at eigarin eftir áheitan frá og vegna Uttanríkis- og mentamálaráðið letur lýsa byrðu á ognina/bygningin, um at søla, avhendan, útleigan, veðseting ella broyting í nýtsluni av ognini/bygningum einans kann fara fram við skrivligum loyvi frá Føroya Landsstýri,
- at bygningurin lýkur øll neyðug myndugleikakrøv sambært galdandi byggireglugerð, galdandi byggisamtykt, umframt møguligar serstakar treytir, ið álagdar eru í byggiloyvinum. Tað er somuleiðis eitt krav, at bygningurin er endaliga brunagóðkendur,
- at avvarðandi byggimyndugleiki hevur fráboðað eigaranum endaligt nýtsluloyvi til bygningin, og
- at endaligur grannskoðaður roknskapur er latin Uttanríkis- og mentamálaráðnum og góðkendur av ráðnum.
- Um nevndu treytir ikki verða loknar, fellur tilsøgnin burtur, og útgoldin stuðul kann verða kravdur goldin aftur til landskassan.

**Til § 2**
Gildiskomuáseting og sólsetursáseting, har heimildarlógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. des. 2026, hóast verkætlanin væntast at verða liðug í 2025. Hetta til tess at leggja upp fyri, at møgulig óvæntað mál kunnu stinga seg upp, sum gera, at tørvur er á at hava lógina í gildi eitt longri tíðarskeið.

Almanna- og mentamálaráðið, xx. juli 2023.

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: